# Teitur og Tarira fyri friði og frælsi í Tibet

**- Sum tónleikari noyðist eg at hava moralin við. Um eg á nakran hátt kann stuðla arbeiðinum fyri friði í Tibet, so er eitt av endamálunum rokkið, sigur Teitur Lassen, sum luttekur á altjóða tónleikaútgávu, sum Dalai Lama hevur tikið stig til í sambandi við OL í Kina**

TÓNLEIKAÚTGÁVA
*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*

Teitur Lassen og føroyska kórið Tarira eru við á einari fløgu við heimskendum stjørnum sum Sting, John Mayer, Dave Matthews, Moby, Suzanne Vega og Alanis Morisette. Tað var andaligi leiðarin í Tibet, sum hevur heitt á heimsstjørnurnar um, gjøgnum tónleikin, at varpa ljós á frælsisstríðið í Tibet. Fløgan hevur fingið heitið "Songs for Tibet – The Art of Peace".

- Dalai Lama fekk sjálvur hugskotið til eina slíka felagsútgávu við tónleiki frá kendum tónleikarum. Hann setti seg í samband við felagsskapin »the Art of Peace Foundation«, um at hjálpa sær við útgávuni, sigur Teitur Lassen. Hetta er buddistiskur NGO-felagsskapur, sum virkar fyri at friði og mannarættindum, serliga í Tibet, við støði í læruni hjá andaliga leiðaranum har, Dalai Lama.

- Hetta er kanska seinasti møguleikin veruliga at gera vart við støðuna í Tibet gjøgnum heimspressuna, nú OL er í Kina, sigur Teitur Lassen við Sosialin, nú vit ringja til hansara yviri í Gotlandi.

### Friðartónar

Hann greiðir eisini frá, at løgini á fløguni endurspegla friðarboðskapurin hjá Dalai Lama, og at andaligi leiðarin ber stóran ótta fyri, hvat kinesiskirmyndugleikar finna uppá í Tibet, tá OL er av.

- Støðan í Tibet er sera spent og vandi er fyri nógvum ófriði og møguliga einum fólkamorði, tá olympisku leikirnir eru av. So hetta er ein roynd at gera vart við umstøðurnar har yviri og at skapa ein dialog við kinesisku myndugleikarnar, sigur Teitur Lassen, sum sjálvandi er sera fegin um, at sleppa at luttaka í altjóða vælgerandi arbeiði á hendan hátt.

### Fyrigevingin

Spurdur, hvussu hann kom upp í leikin, greiðir Teitur frá, at fólkini handan verkætlanina kendu tónleik hansara.

- Eg havi spælt rættiliga nógv í USA og har kendu tey meg. Vit sum luttaka fingu eitt skriv frá Dalai Lama, har hann vinarliga heitir á okkum um at hjálpa sær í frælsisstríðnum á hendan hátt, sigur Teitur Lassen. Løgini skuldu hava ein friðarboðskap – antin innara ella globalan frið, og av tí, at alt kom rættiliga seint í lag, skuldu løgini vera til frammanundan, so tey lættliga kundu spælast inn av nýggjum.

- Eg valdi lagið »All my mistakes«, sum snýr seg um at gera mistøk og at duga at fyrigeva, sigur Teit-




*Teldutøka útgávan av "Songs for Tibet – The Art of Peace", sum kom út 5. august, gjørdist longu fyrsta dagin mest seljandi teldutøka útgávan á iTunes í USA, Kanada, Fraklandi, Italia og Hollandi. Fløgan kom í handlarnar í gjár, 12. august*



**Teitur Lassen og føroyska kórið Tarira eru við á einari fløgu við heimskendum stjørnum sum Sting, John Mayer, Dave Matthews, Moby, Suzanne Vega og Alanis Morisette.**

*- Nú OL er í Kina er hendan fløgan kanska seinasti møguleikin veruliga at gera vart við støðuna í Tibet gjøgnum heimspressuna, og á tann hátt at koma í dialog við kinesiskir myndugleikar, sigur Teitur Lassen við Sosialin*